


# Fleiri fólk í Føroyum



*Samlað veksur fólkatalið í Føroyum, men á útoyggjunum gongur øvugtan veg*

*Savnsmynd*

Tey fækkast á útoyggj, men sum heild veksur fólkatalið í Føroyum... um seinni enn seinni, enn nógv kundu ynskt.

1. februar vóru vit 48.425 individ í Føroyum. Hetta eru 119 fleiri enn fyri einum ári síðani og 303 fleiri, enn tað vóru somu tíð í 2006.

Av teimum 17 oyggjunum, har fólk býr í Føroym, eru átta sum eru partur av útoyggjafelagnum. Samanlagt búðu á hesum oyggjum 345 fólk 1. februar 2006. Tvey ár seinni sæst, at hetta er minkað við 15 fólkum niður á 330 fólk. Av samlaða fólkatalinum hesi árini hava sostatt í miðal 0,7 prosent bústað á útoyggj.

Meðan fólkatalið í Føroyum síðani 1. februar 2006 – og til somu tíð í ár – er vaksið við 303 fólkum, eru tey á útoyggj sama tíðarskeið vorðin 15 færri.

*kelda: hagstova.fo*

# 15 lógaruppskot fyri tingið

**Fyrstu dagarnar tá løgtingið kom saman, eftir at nýggj samgonga varð skipað, var tað andstøðan, sum legði øll uppskotini fram. Nú er tíðin komin til samgonguna, sum í gjár legði 15 lógaruppskot fyri tingið**

Lógaruppskotini eru hesi:

- Uppskot til løgtingslóg um bygging av sambýli í Tórshavn til sinnisveik
- Uppskot til løgtingslóg um bygging av økisdepli í Vági til sinnisveik
- Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um keyp av nýggjari KT-heildarskipan til Almannastovuna
- Uppskot til eykajáttanarløgtingslóg (broyting í løgtingslóg um bráfeingis játtanarlóg fyri 2008)
- Uppskot til løgtingslóg um broyting av løgtingslóg um áseting av skatti (ásetingarlógin)
- Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um ræði á málum og málsøkjum (Yvirtøka av málsøkinum Veðurtænasta)
- Uppskot til løgtingslóg um triðja útbjóðingarumfar til leiting eftir og framleiðslu av kolvetnum
- Uppskot til løgtingslóg um íløgu í kringvarpssendinetið. Málið verður lagt fyri Løgtingið
- Uppskot til løgtingslóg um at byggja miðnámsskúladepil í Tórshavn
- Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um ræði á málum og málsøkjum (Yvirtøka av málsøkinum halgidagslóggáva)
- Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um ræði á málum og málsøkjum (Yvirtøka av málsøkinum mát og vekt)
- Uppskot til løgtingslóg um skyldu arbeiðsgevarans at fráboða løntakaranum treytirnar fyri setanarviðurskiftunum (setanarprógv)
- Uppskot til løgtingslóg um at broyta løgtingslóg um barsilsskipan
- Uppskot til løgtingslóg um at leggja virksemið hjá Vága Floghavn í P/F Vága Floghavn
- Uppskot til løgtingslóg um marknaðarføring.

*kelda: løgmansskrivstovan*



*Síðani samgongan varð skipað, hevur landsstýrið lagt tilsamans 31 lógaruppskot fyri Løgtingið. Slakur helmingurin av hesum komu niðan í tingið í gjár*

*Savnsmynd*